– trygt og ómakaleyst til hús



INNI

# Undir Kongavarða

**Nú fara vit undir 2. byggistig, so nú hevur tú eisini møguleikan at vera við**









## Tað nýggjasta

Fólk eru flutt inn í raðhúsini, og tey fyrstu eru flutt inn í punkthúsini. Koyrir tú ein túr í økinum, er umhvørvið av einari frálíkari bústaðarloysn týðiliga komið til sjóndar. Nærum alt er selt, so nú fara vit at byrja uppá 2. byggistig.

## Eftir til sølu

Nú eru bert 4 raðhús á 209 m² eftir til sølu eins og 6 íbúðir á 131 m² og 4 handils- / vinnuhølir á 130 m², so nú fara vit fyri fyrst at byggja fleiri raðhús í 2 hæddum.

## Nýggju raðhúsini

Lyklakláru raðhúsini eru eins og tey fyrru í 2 hæddum á 74 m² – í alt 148 m², og hartil er bilskúrur / hjallur og útigólv. Tey standa við stórum vindeygum og panoramaútsýni móti Havnini og fjørðinum og við útigólvi / altan móti frálíka sólarganginum suðureftir og vestureftir.

## Persónligur stílur

Bústaðirnir verða frálíkir við góðum møguleika fyri at innrætta seg eftir áhuga og ynski. Møguleiki verður fyri sjálvur at velja millum ávís sløg av gólvum og ymiskum sniðum og litum til køkin. Her ber til at skapa sær tað heilt rætta heimið við persónligum stíli.

## Býlingurin og umhvørvið

Býlingurin verður sum frá líður ein nýggjur og heilskapaður býarpartur við skipaðum arkitekturi, ið gevur fólki avbjóðingar, frið og tryggleika. Alt verður gjørt liðugt millum húsini við vegi, gongubreyt, spæliplássi, sparkivølli og hugnaligum umhvørvi, og stóru vindeyguni geva ljósinum frítt spæl og leggja Nólsoyarfjørð og Havnina opna fyri eygað.

## Liviligt og lívligt

Millum húsini verður felagsøki, har grannarnir hava møguleika fyri at skipa fyri ymiskum. Har vera gróðursettir runnar, ið geva lívd og nærleika til hugna og spæl, og her eru hyljareygu, spælipláss, spælivøllur og annað, girt við snøggum løðingum og gøtum ímillum. Beint sunnanfyri er gøta niðan á Reyn til nýggjan dagstovn og til spildurnýggja skúlan, ið stendur í gerð.

## Nýggju raðhúsini

**Hæddir:**............2
**Gólvvídd í alt:**...148 m²
**Ovara hædd:** Trappugongd, stova / alrúm við útgongd til útigólv, baðirúm og 3 kømur
**Niðara hædd:** Bilskýli, hjallur, grovkøkur, baðirúm, durur, køkur / stova / trappugongd til ovastu hædd
**Prísur:**...............Kr. 2.470.000 + kr. 150.000, sum fólk skulu leggja út fyri mvg, men kunnu fáa afturrindað frá TAKS, um bindandi avtala er undirskrivað fyri 1/6-2010.

**Meira fæst at vita hjá P/F Inni – tel. 354200 og á heimasíðuni www.inni.fo. Tú ert altíð vælkomin at støkka inn á gólvið til eitt óbindandi húsaprát.**





PF inni
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**